Kunngerðablaðið A

2011 Hefti 44

ISSN 0907-905X

Nr. 149 21. november 2011

**Kunngerð
um
summartíð 2012, 2013, 2014, 2015 og 2016**

Við heimild í § 1 í løgtingslóg nr. 66 frá 21. mai 1980 um summartíð verður ásett:

**§ 1.** Í árunum 2012, 2013, 2014, 2015 og 2016 verður nýtt serstøk tíðarrokning, summartíð, í hesum tíðarskeiðum:

1) Í 2012 í tíðini millum 25. mars og 28. oktober.
2) Í 2013 í tíðini millum 31. mars og 27. oktober.
3) Í 2014 í tíðini millum 30. mars og 26. oktober.
4) Í 2015 í tíðini millum 29. mars og 25. oktober.
5) Í 2016 í tíðini millum 27. mars og 30. oktober.

**§ 2.** Summartíðin byrjar á fyrstnevnda degi í hvørjum av tíðarskeiðunum kl. 01.00, og verður klokkutíðin tá broytt og sett til kl. 02.00.
*Stk. 2.* Summartíðin endar á síðstnevnda degi í hvørjum av tíðarskeiðunum kl. 02.00, og verður klokkutíðin tá broytt til kl. 01.00.
*Stk. 3.* Tann farni tímin verður í tíðarrokning tilskilaður sum kl. 01.00 B og tann komandi tímin sum kl. 01.00 A.

**§ 3.** Henda kunngerð kemur í gildi 1. desember 2011. Samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 91 frá 3. oktober 2006 um summartíð 2007, 2008, 2009, 2010 og 2011.

Innlendismálaráðið, 21. november 2011

**Kári P. Højgaard (sign.)**
landsstýrismaður

/ Rúni Joensen (sign.)

FØROYAPRENT · Svanamerktur prentlutur 541 705

**Hefti 44 • Nr. 149 • Útgivið tann 25. november 2011**